50 ÁRA
FØÐINGARDAGSTILBOÐ
galdandi frá mánadegi 29. oktober til mánadagin 12. november

RESTAURANT HAFNIA
kl. 12.00 - 21.30

Rækjucocktail ella Laksaroulada
&
Jubileumsbúffur við bátaeplum og grønmeti

2 rættir bert 98,-

HAFNIA LOUNGE
kl. 14.00 - 17.30

Kaffi/ te/ kakao & lagkøka

bert 28,-

Hotellið í miðbýnum
Tel 31 32 33

HOTEL HAFNIA

Hárfríðkanarhøllin
Hoydalsvegur 40 · tlf 313449

Lydia Siri Ann Annika Fríðgerð

Opið mán. - hós. 9-17 · frí. 9-18 · ley. 9-13

Røktan
v/Elsu í Garði
Læknaeks. kosmetolog
Hoydalsvegur 40
FO-100 Tórshavn
Tlf. 32 19 90
Tlf. 22 07 97

Andlits-, hond-, fót- og kropsviðgerð · Gávukort

Fulltrúi til skrivstovuna hjá Dátueftirlitinum

Dátueftirlitið er ein óheftur fyrisitingarmyndugleiki, sum vísir til Løgmansskrivstovuna.

Dátueftirlitið er skipað við ráði og avgreiðsluskrivstovu og hevur eftirlit við allari viðgerð, sum lógin um viðgerð av persónsupplýsingum fevnir um.

Dagliga virksemi hjá dátueftirlitinum verður røkt av avgreiðsluskrivstovuni. Ráðið, sum landsstýrismaðurin setir, er skipað við formanni og 2 øðrum limum. Ráðið ger egna reglugerð og nærri reglur um arbeiðsbýti millum ráð og avgreiðsluskrivstovu.

Uppgávan hjá Dátueftirlitinum er fyrisiting av persónsupplýsingarlógini.

Eftirlitið hevur av sínum eintingum ella eftir klagu frá einum skrásettum eftirlit við, at øll viðgerð, sum lógin fevnir um, bert fer fram í samsvari við lógina og reglum ásettum við heimild í lógini.

Av øðrum uppgávun kann nevnast vegleiðing og ráðgeving av almennum myndugleikum og privatum viðvíkjandi skráseting og viðarigeving av persónsupplýsingum, viðgerð av klagum og málum, sum ráðið av sínum eintingum hevur tikið upp, og viðgerð av fráboðanum og umsóknum um loyvir.

Dátueftirlitið hevur heimild til at gera kanningar á staðnum hjá almennum myndugleikum og hjá privatum.

Dátueftirlitið skal geva ummæli til ætlaða lóggávu, sum viðvíkur persónsupplýsingum og annars virka fyri góðum dátuviðgerðarsiði.

Við hesum verður søkt eftir fulltrúa til skrivstovuna hjá dátueftirlitinum.

Uppgávur
Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroyttar so sum málsviðgerð, vegleiðing og ráðgeving av almennum myndugleikum og privatum, fyrireiking og tilrættisleggjan av fundum og málsviðgerð hjá ráðnum, dagføring av heimasíðuni við kunnandi tilfari, gera ársfrágreiðing og virkisætlan.

Faklig førleikakrøv
Sett verður sum krav, at umsøkjarar hava útbúgving frá hægri læristovni. Tó kunnu eisini tey søkja, ið væntandi verða liðug næsta summar.

Persónlig førleikakrøv og royndir
Umsøkjarar skulu kunna arbeiða sjálvstøðugt, vera miðvísir og hava góð samstarvsevni. Umsøkjarar skulu harumframt hava góðan kunnleika til edv og til føroyskt mál.

Løn og setanartreytir
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi fakfelag.

Vit kunnu bjóða
Talan er um eitt sjálvstøðugt starv við nógvum avbjóðingum, har møguleiki er fyri at hava ávirkan á arbeiðsuppgávurnar. Góðir møguleikar fyri upplæring og eftirútbúgving.

Nærri upplýsingar um starvið
Møguligir umsøkjarar kunnu seta seg í samband við Rúna Joensen, deildarstjóra ella Ingunn Eiriksdóttir fulltrúa tlf. 351010, fyri at hoyra meira um starvið.

Umsóknir
Umsóknir við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skulu sendast
Løgmansskrivstovuni
Tinganes
Postboks 64
110 Tórshavn

og skulu vera Løgmansskrivstovuni í hendi í seinasta lagi á middegi fríggjadagin 9. november 2001.

Sølu/Marknaðarleiðari

Eitt spennandi og áhugavert starv sum sølu- og marknaðarleiðari er leyst at søkja hjá **P/f Vónini.**

Arbeiðsuppgávurnar fevna um sølu og marknaðarføring innanlands eins væl og uttanlands.

Tann, sum settur verður, má m.a. vera kønur í norðurlendskum og enskum máli, vera vanur við telduarbeiði og eiga at vera førur fyri at leggja søluarbeiðið væl til rættis.

Arbeiðið er sera spennandi, fjølbroytt og sjálvstøðugt, og í sera góðum arbeiðsumhvørvi.

Lønarviðurskifti og setanartreytir verða avtalað við leiðsluna.

Umsókn, saman við møguligum prógvum, eigur at vera okkum í hendi í seinasta lagi 1. november.

P/F Vónin
Bakkavegur 22
Postboks 19
FO-530 Fuglafjørður
Tlf. 444246

P/F Vónin
Álaker
FO-100 Tórshavn
Tlf. 354391

Goymslufólk

Hervið verður søkt eftir einum fólki m/k til goymslu okkara at byrja skjótast gjørligt.

Fyrimunur er, um umsøkjarin hevur goymslu- ella lærlingaútbúgving, men hetta er ikki nakað krav.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Svend Krosstein ella Jan Danielsen.

Hevur hetta tín áhuga, so send okkum eina umsókn.

Svend Krosstein
Falkavegur 6 - FO 110 Tórshavn
Tel. 314600 - Fax 314601
Teldupostur: sk@post.olivant.fo

Pf. Svend Krosstein er einasta VVS-heilsøla í landinum, og hevur eisini størsta VVS-handil í landinum. Vit selja m.a. alt tilfar til: kloakkleiðingar, vatnleiðingar, hita og sanitet og veiðireiðskap. Í fyritøkuni starvast í løtuni 16 fólk fulla tíð.

Pedagogur

Søkt verður eftir pedagogi til barnagarðin við Velbastaðvegin, 40 tímar um vikuna, at byrja 1.desember 2001.

Barnagarðurin við Velbastaðvegin er sjálvognarstovnur og normeraður til 60 børn í aldrinum 3 - 7 ár, býtt sundur í 3 stovur.
Á hvørjari stovu starvast í løtuni tveir pedagogar og eitt hjálparfólk.

Førleikar: Tann ið verður settur, skal hava góð samstarvsevnir, vera kreativur, dáma at vera í náttúruni og síggja møguleikarnar í okkara nærumhvørvi, arbeiða sjálvstøðugt og duga at síggja tørvin hjá tí einstaka barninum.

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skal vera Barnagarðinum í hendi í seinasta lagi 9.november 2001 kl. 12.00

Nærri upplýsingar um starvið, fáast við at venda sær til leiðaran á **tlf. 314373.**

Barnagarðurin við Velbastaðvegin
Velbastaðvegur 41
FO 100 Tórshavn

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 1236, P/F Alilaks, 530 Fuglafjørður.

Viðtøkur broyttar: 22.08.2001.
Kapitalur: Hækking við kr. 15.000.000,00 til kr. 16.100.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 15.000.000,00 til kurs 100.

Skráseting Føroya tann 26. oktober 2001

Kristin Balle

tvis
DYGDAR BAÐIRÚMSMØBLAR

Við framkomnari telduútgerð tekna vit júst tygara baðirúm so at tú fært eina mynd av veruliga baðirúminum.

pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • Tel. 44 75 60 • Fax 44 84 60

Frá nú av til jóla:
VIKUSKIFTISTILBOÐ
á Hotel Tórshavn

- ***Gist verður fríggjakvøld & leygarkvøld.***
- ***Øll kømur eru útgjørd við sjónvarpi, telefon og einum snotiligum baðirúmi.***

einans 480,- fyri hvønn

HOTEL
Tórshavnar Sjómansheim
TÓRSHAVN
★★★

Tórsgøta 4 • P.O. Box 97 • FO-110 Tórshavn • Tel +298 350 000 • Fax +298 350 001
e-mail: hotel@post.olivant.fo

VETRARDEKK

Allar støddir av vetrardekkum við ella uttan píkar á goymslu.

Ókeypis ásetan

Ringi og fái meira at vita

pf AUTO-VULK
FO-900 Vágur
Tlf. 373680 - 373660
223380
Fax 374680
VULKANISERING OG BILVERKSTADUR

Frá Sandoyar Kvøldskúla

Treytað av nóg stórari undirtøku og myndugleikanna góðkenning verður skipað fyri VHF/SRC-skeiði. Tilmelding á tlf./fax 361038/361866 ella hjá læraranum Edvard Ingebrigtsen, tlf. 424121.

Sandoyar Kvøldskúli

Fólk søkist

Blíð og fyrikomandi genta søkist til arbeiði í handli seinnapartar, skal helst hava koyrikort, hava arbeitt í handli fyrr og ikki vera bangin fyri at taka fatt. Kann byrja skjótast gjørligt.

Hjá Siri

www.sosialurin.fo